# ítróttur

Nr. 35 • Fríggjadagur • 17. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gullið stendur upp á spæl

**Stóru flogbóltsdystirnir í hesum árinum verða spældir í Havn leygardagin. Menninir hjá Fleyr og kvinnurnar hjá TB verða mettir sum favorittar**

FLOGBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin verða steypafinalurnar í flogbólti spældar í Havn. Hesir dystir mugu metast sum størstu flogbóltsdystirnir í árinum, tí sent verður beinleiðis í sjónvarpinum frá dystunum.

Bæði menn og kvinnur spæla steypafinaluna leygardagin, og meðan finalan hjá kvinnum tykist verða rættiliga opin, má toppliðið Fleyr metast sum favorittur í finaluni hjá monnum.

Sambært einum quick-poll, sum er á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum, so halda tey flogbóltsáhugaðu, at TB fer at vinna hjá kvinnum, og at Fleyr fer at vinna hjá monnum.

### Klassikari hjá monnum

Tað verða Fleyr úr Havn og Mjølnir úr Klaksvík, sum fara at spæla steypafinaluna hjá monnum, og her er talan um ein veruligan klassikari millum tey nógv vinnandi feløgini.

Seinnu árini hava onnur feløg ofta blanda seg upp í gullstríðið í steypa- og landskappingini, men nú fáa tey bæði sigursvandu feløgini møguleikan at dystast í einum avgerandi dysti aftur.

Fleyr hevur havt eitt sera gott kappingarár í vetur, og liðið liggur eisini greitt á odda í meistaradeildini. Eftir nøkur heldur lak ár hevur Fleyr veruliga styrkt sær um liðið í ár, og tað hevur givið úrslit.

Menninr hjá Mjølni tykjast ikki hava somu styrki, sum teir til dømis høvdu í fjør, men Mjølnir er tó komið nakað fyri seg seinastu vikurnar, og í dysti við SÍ, eydnaðist tað Mjølni at spæla seg í finaluna.

### Tey næstbestu dystast

Oddaliðið í landskappingini hjá kvinnum er ikki við í steypafinaluni, og tí verða tað tey næstbestu liðini í deildini, TB og ÍF, sum skulu dystast um steypagullið.

TB hevur verið millum sterkastu kvinnuligu flogbóltsliðini í landinum í fleiri ár, og hóast tað ikki hevur gingið rættiliga soleiðis í ár, so er TB framvegis við í rætta endanum.

Til steypafinaluna fáa tey styrk frá einum av teirra bestu spælarum, Gudrid Nolsøe, sum er komin heim at spæla. Gudrid hevur spælt 36 landsdystir fyri Føroyum, og hon er í hesum hópi tann mest royndi spælarin hjá TB.

Sjónvarpið sendir frá báðum finalunum leygardagin, og lagt verður fyri við kvinnufinaluni kl. 14.20.



*TB og ÍF eru í landskappingini í tøttum dysti um silvurmerkini. Men í steypafinaluni er tað gullið, sum spurningurin snýr seg um*

**Dystir um vikuskiftið**

**Hondbóltur - Sunset-kappingin - FM-bólkurin**

| Dagur | kl. | dystur | dómari |
|---|---|---|---|
| 18.02 | 15.30 | Stjørnan-Neistin | Heri & Dánjal |
| 19.02 | 14.30 | Kyndil-VB | Kristian & Sámal |

**Niðari bólkurin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18.02 | 15.00 | Tjaldur-StÍF | Rúni & Ragnar |
| 19.02 | 14.30 | VÍF-Søljan | Kári & Dánjal |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 19.02 | 16.00 | Kyndil-H71 | Kristian & Sámal |
| 19.02 | 16.00 | StÍF-Neistin | Hallur & Petur |
| 19.02 | 16.00 | VÍF-KÍF | Kári & Dánjal |

**Flogbóltur - Steypafinalur - Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 18.02 | 14.30 | TB-ÍF |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18.02 | 16.30 | Fleyr-SÍ |

**Sunset-kappingin FM-bólkurin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 106 | 87 | 19 | 6 |
| 2 Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 102 | 83 | 19 | 6 |
| 3 VB | 4 | 2 - 0 - 2 | 87 | 100 | -13 | 4 |
| 4 Kyndil | 4 | 0 - 0 - 4 | 76 | 101 | -25 | 0 |

**Sunset-kappingin Niðari bólkurin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 102 | 73 | 29 | 8 |
| 2 Søljan | 3 | 2 - 0 - 1 | 61 | 60 | 1 | 4 |
| 3 VÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 81 | 98 | -17 | 2 |
| 4 Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 62 | 75 | -13 | 0 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 16 | 15 - 1 | 47 | 19 | 28 | 20 |
| 2 TB | 16 | 9 - 7 | 34 | 23 | 11 | 14 |
| 3 ÍF | 16 | 9 - 7 | 36 | 28 | 8 | 12 |
| 4 SÍ | 16 | 9 - 7 | 34 | 31 | 3 | 11 |
| 5 KÍF | 16 | 3 - 13 | 18 | 42 | -24 | 5 |
| 6 Mjølnir | 16 | 3 - 13 | 17 | 43 | -26 | 4 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 13 | 11 - 2 | 35 | 15 | 20 | 15 |
| 2 SÍ | 12 | 8 - 4 | 29 | 17 | 12 | 10 |
| 3 Mjølnir | 12 | 7 - 5 | 27 | 16 | 11 | 10 |
| 4 ÍF | 13 | 5 - 8 | 21 | 28 | -7 | 7 |
| 5 Nøvan | 12 | 0 - 12 | 0 | 36 | -36 | 0 |



Les Sosialin so ert tú við

SÍ-ÍF 2-3 (17-25, 25-20, 25-28, 23-25, 13-15):

## SÍ punkteraði

Mansliðini hjá ÍF og SÍ spældu í gjárkvøldi í meistaradeildini í flogbólti. Ein dystur, sum sørvingar skuldu vinna, um teir skuldu halda fast í vónini um at fáa Fleyr aftur á stigatalvuni.

Eina løtu sá eisini gott út hjá vertunum. ÍF tók fyrsta settið greitt, men so kom SÍ ígongd. Teir tóku tey bæði næstu settini í stórum stíli, , men fuglfirðingar svaraðu tó aftur. Tá nervarnir av álvara komu í hásæti seinastu settini, vóru tað nevnliga teir, sum drógu longra stráðið í einum spennandi 3-2 sigri.

Fyri SÍ merkti tapið, at teir framvegis eru fimm stig aftan fyri Fleyr. Og hóast sørvingar framvegis hava spælt ein dyst færri, so mundi talan her meira ella minni vera um eina seinastu punktering av FM-vónini.

Fleyr hevur framvegis tríggjar dystir eftir at spæla, og fýra stig í hesum báðum vilja við 100% vissu plasera meistaraheitið í Havn.

**-mørk**

---

## Venjarar til Havnar Róðrarfelag

Nevndin í Havnar Róðrarfelag hevur gjørt avtalu við Katrin Olsen og danska Søren Madsen, sum hevur róð á danska lættvekts-fýraranum

Katrin Olsen, ið er vælkend í róðrarumhvørvinum í Føroyum og Danmark, fer longu um vikuskiftið at venja saman við manningunum hjá felagnum.

Seinni í mánaðinum kemur so eisini kendi danski rógvarin, Sørin Madsen at hjálpa til í venjingunum. Søren var millum annað partur av manningini, sum hevur vunnið silvur og bronsumerki í HM- og OL-hópi.

Ætlanin er, at Søren við jøvnum millumbili skal koma til Føroya, soleiðis at ein verulig ætlan er í venjingunum.

**-mørk**